

# Gøtumaður teknar til eina milliard kr

## Teknar opera-hús í Dubai

Henning Larsen Tegnestue, har Ósbjørn Jacobsen arbeiðir, var við til at gera nýggju donsku Operuna, og fyritøkan hevur eisini verið við til at mynda onnur tónleikahús.

– Tá ið Operahúsið í Keypmannahavn var liðugt, var tað líkasum eitt vakum í fyritøkuni, tí júst tá høvdu vit eingi projekt við tónleikahúsum, men nú eru aftur fleiri projekt, sigur Ósbjørn.

– Vit eru við at gera eitt konserthús í Uppsala, og nú arbeiði eg við at tekna eitt operahús í Dubai. Hetta er ein kapping, sum vit eru við í, og eg skal brúka komandi tíðina til hetta projektið, sigur hann.

**Arkitekturin Ósbjørn Jacobsen var mikudagin partur av einum stórum og søtum sigri, tá ið Portus Group vann kappingina at gera eitt nýtt íslendskt tjóðarkonserthús fyri 12 milliardir íslendskar krónur. Gøtumaðurin hevur verið við til at tekna tað stórfingna húsið, og meðan heimskendir arktitektar snávaðu á vegnum, hildu Ósbjørn og hansara strikur hildu allan vegin í kappingini**

ARKITEKTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinnapartin mikudagin var avdúkað, hvør hevði vunnið kappingina um at gera, byggja og reka eitt nýtt risaprojekt í Íslandi, har eitt stórsligið konserthús fyri meira enn eina milliard føroyskar krónur er í miðdeplinum.

Valið fall á fyritøkurnar, sum høvdu tikið seg saman í Portus Group, og ein av monnunum í hesum samstarvinum er gøtumaðurin Ósbjørn Jacobsen.

Hann er arkitektur hjá Henning Larsen Tegnestue, og danska felagið hevði fingið uppgávuna at sniðgeva nýggja konserthúsið hjá Portus Group. Hetta var ein týðandi og sentral uppgáva í projektinum, tí umframt at fáa projektið at hanga saman fíggjarliga, so var tað avgerandi fyri lagnuna hjá verkætlanini, hvussu konserthúsið kom at síggja út.

– Hetta er eitt umfatandi samstarv millum átta feløg av ymsum slagi, og tað hevur verið eitt gott teamwork. Vit hava havt uppgávuna at tekna konserthúsið, og vit eru sera fegin um, at vit vunnu kappingina, sigur Ósbjørn Jacobsen, sum mikudagin var í Reykjavík til avdúkingina av verkætlanini.

### Harðar kappingar um bygningar

Ósbjørn Jacobsen tók í 2000 útbúgving sum arkitektur í Århus, og tað var gjøgnum endaliga projektið hjá sær, at hann fekk starv hjá Henning Larsen Tegnestue, sum er eitt sera kent og virt arkitektafelag í Danmark.

Har hevur hann starvast síðani 2000 og hevur verið við til at mynda nógvar stórar bygningar í fleiri ymiskum londum.

– Vit eru allatíðina við í kappingum um at tekna ymsar bygningar, men tað er kanska einaferð út av 10, at tú vinnur eina kapping, og tí eru vit sera fegin um, at konserthúsið, sum vit vóru við til at gera í Íslandi, verður til veruleika, sigur Ósbjørn.

Hann hevur verið annar av arkitektunum hjá Henning Larsen, sum hava arbeitt mest sum burtur av við hesum projektinum í næstan eitt ár.

– Vit hava verið tveir, sum hava teknað og arbeitt við hesum alla tíðina, og á vegnum hava vit so avleverað fyribils uppskot, kjakast um tey, fingið ráð og meiningar, og síðani farnir víðari við tekningunum, sigur hann.

### Vann á heimskendum arkitektum

Tað var ein søtur sigur, sum Ósbjørn Jacobsen og hansara starvsfelagar høvdu í Reykjavík mikudagin, tí kappingin um at standa fyri nýggju verkætlanini hevur verið sera hørð.

Umframt at tekna konserthúsið umfatar projektið nógv annað. Kravið var, at tey, sum vildu standa fyri projektinum, ikki bara skuldu sniðgeva og koma við hugskotum, tey skulu eisini byggja, fíggja og reka konserthúsið í 35 ár.

Harafturat skuldu skitsur eisini gerast fyri økið, har stórt gistingarhús, handilsdepil og annað eisini skal byggjast. Hesin parturin av projektinum er ikki enn so ítøkiligur, sum sjálvt konserthúsið er, men alt økið skal við tíðini sniðgevast av vinnaranum.



*Ósbjørn Jacobsen starvast hjá danska arkitektinum Henning Larsen, og hann er annar av teimum, sum hava arbeitt burtur av við at tekna nýggja íslendska tjóðarkonserthúsið*

*Mynd: Bárður Eklund*